

# Sethús til sølu

## Á Lygnnesi 12, Kollafjørður

Byggiár 2001. Stødd 117m$^2$ x 2. Grundøki 522 m$^2$.

**Ovara hæddin:** Durur, gangur, køkur, stova, tvey baðirúm og 4 kømur.

**Niðara hæddin:** Óinnrættað. Betonggólv. Rør/vatnveiting og el-installation løgd.

Húsini standa væl fyri í bygdini við blindveg. Umhvørvið er friðarligt og sera barnavinarligt.

**Meira fæst at vita vid at vitja www.123hjemmeside.dk/sethus-kollafjordur, ella ringa á tlf 22 14 80.**

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

# Fulltrúi til Almannamálaráðið

Eitt starv sum fulltrúi í Almannamálaráðnum er leyst at søkja.

Umsóknarfreistin er 17. august 2009, kl. 12.00. Nærri fæst at vita um starvið, við at fara inn á heimasíðu okkara: www.amr.fo undir "leys størv" har nágreinilig lýsingin stendur.

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 50 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHS@AHS.FO



**Hesin fitti Opel Kadett B**

**er til til sølu. Er fyrstu ferð skrásettur í august 1973 og er í sera góðum standi. Hevur einans koyrt 54.000 km. Hevur havt tveir eigarar, tann fyrra fyrstu 28 árini. Til sølu fyri 22.000 kr**

**Ringið 216409**

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 00 · Fax: 37 11 42
ssh@ssh.fo · www.ssh.fo

# Goymslufólk

Eitt hálvtíðarstarv sum starvsfólk í goymsluni er leyst til setan skjótast møguligt.

**Starvið umfatar m.a.:**

- innkeyp av nýsluvørum
- útflýggjan av vørum til deildir, stovnar og privatfólk
- samstarv við seljarar
- uppfylling av vørum eftir ynski frá starvsfólkum á deildinum
- aðrar parktiskar uppgávur á goymsluni.

**Við vænta at viðkomandi:**

- hevur útbúgving sum sjúkrahjálpari/ sjúkrarøktarfrøðingur ella líknandi
- er opin fyri at nema sær kunnleika um ymsu vørurnar við t.d. at fara á neyðug skeið
- kann undirvísa starvsfólkum um nýtslu av vørum
- hevur góð samstarvsevnir
- er fyrikomandi
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

Løn og setunartreytir sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst st vita um starvið við at venda sær til Thyru Thorsteinsson, fyristøðukvinnu tlf. 34 33 00 lok 3215

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

Sjúkrahússtjóran
Suðuroyar Sjúkrahús
Sjúkrahúsbrekkan 19
800 Tvøroyri

Umsóknarfreistin er 10. august 2009

# Nýtt teoriskeið

Teoriundirvísing til lastbil, trailara og buss byrjar **mánadagin 3. august kl. 18.00.**

Undirvísari er Hans Jacob Hermanssen, tlf. 218777 / 573940, teldupostur: hajah@olivant.fo ella jh505@kallnet.fo




Skrivarin.fo
– persónlig nettænasta

**Er eisini til arbeiðis, tá onnur halda frí**

www.skrivarin.fo · info@skrivarin.fo

GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Gigni – heilsufrøði til børn & ung søkir eftir varaleiðara. Starvið verður at seta 1. september 2009 ella skjótast tilber.

Gigni er sjálvstøðugur stovnur undir Heilsumálaráðnum. Gigni veitir heilsufrøði til børn, ung og familjur, skift á umleið 5000 smábørn, umelið 700 nýfødd børn árliga og 7000 skúlabørn á 60 skúlar.

Gigni veitir ráðgeving til starvsfólk á stovnum fyri børn og ung og allar skúlar í føroyum. Umframt hetta áliggur tað Gigni at hava eftirlit viðvíkjandi heilsu- og trivnaðarviðurskiftum á stovnum og skúlum.

Gigni arbeiðir sambært lóg "Fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung" og sambært tilráðingar frá Danska Heilsustýrinum.

**Vit kunnu bjóða:**

- Sjálvstøðugt og spennandi arbeiði.
- Góður møguleiki fyri fakligari menning og víðariútbúgving.
- Luttøku í viðkomandi arbeiðsbólkum her og í Norðurlendskum høpi.
- Møguleika til at menna og mynda heilsu- og trivnaðarviðurskifti hjá børnum og ungum í Føroyum.

**Útbúgving:**

- Útbúgving sum heilsufrøðingur.
- Viðkomandi royndir frá heilsufremjandi arbeiði á barna-/familjuøkinum.
- Leiðsluútbúgving og/ella royndir innan leiðslu og fyriskipan.
- Kunnleika til KT.

**Persónligir eginleikar:**

- Framsíggin og arbeiðir strategist mót settum málum
- Kunna ganga á odda, arbeiða sjálvstøðugt og duga væl at fyrisita/leiða
- Viðurkennandi leiðsluhátt
- Góð samstarvsevnir

**Lønar- og setanartreytir:**
Løn sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsókn skal sendast til:
**Gigni – heilsufrøði til børn & ung**
**Niels Finsensgøta 37**
**Postboks 132**
**FO-110 Tórshavn**

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 17. august 2009.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Gigni, tlf. 562300 frá 1. august.

Gigni er stovnur undir Heilsumálaráðnum, ið veitir heilsufrøði til børn og ung, skift á familjur, stovnar og skúlar í Føroyum. Gigni hevur eftirlit við heilsu- og trivnaðarviðurskifti á øllum stovnum og skúlum í Føroyum. Arbeiðið hjá heilsufrøðingunum í Gigni er m.a. at eygleiða og kanna barnið, at ráðgeva og vegleiða foreldrum viðvíkjandi barnsins sálarligu, sosialu og likamligu menning, foreldraleikluti og tilknýti. Á skúlunum er arbeiðið, umframt hetta, at geva regluligar funktiónskanningar, samtala við børn og ung, hetta bæði persónligar, bólkasamrøður og undirvísing.

# Bátur til sølu

Tresfjord 31, Flybridge.
Motororka: 2 x 200 Volvo Penta.

**Tlf. 216003**